# Trupult hjá kirkjum at fáa urguleikarar

**Urguleikarar kring landið hittast leygardagin í komandi viku at tosa um støðuna við urguleiki kring landið. Ein spurningur sum verður viðgjørdur er, um tað ber til at fáa undirvísing í urguspæli inn í Musikkskúlan**

URGULEIKARAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

– Nógvar kirkjur hava longu sera trupult at fáa urguleikarar, m.a. á Sandoynni. Eg vænti, at um nøkur ár verður hetta ein ovurhonds stórur trupulleiki nógvastaðni kring landið, sigur Oddvør Johansen.

Hon starvast sum urguleikari við Havnar kirkju, og hevur gjørt tað síðani 1988. Hon situr haraftrat í nevndini fyri Urguleikarafelagið, sum nú fer at taka støðuna hjá urguleikarum upp til viðgerðar.

Trupulleikin er tann, at illa gongur at fáa urguleikarar til kirkjurnar í Føroyum – og hetta hóast tilboðini um at fáa undirvísing í tónleiki ikki tróta kring landið.

– Vit eiga í dag fleiri ungar urguleikarar, sum hava tikið høgar útbúgvingar innan urguleik, men teir koma ikki heim til Føroyar. Tað er snøgt sagt einki arbeiði til teir her, sigur Oddvør Johansen við "Trúboðin", ið er málgagn hjá Heimamissiónini.

Til tess at fáa eitt orðaskifti í lag um urguleikarar í Føroyum verður fundur hildin í Fríðrikskirkjuni á Toftum leygardagin 19. februar, hagar bæði limir í felagnum og onnur áhugað eru vælkomin.



*Nógvastaðni stendur illa til við urguleikarum í kirkjum okkara. Í Gjáar kirkju hevur ein tó funnið fram til eina high-tech loysn við einari teldu-urgu*

*(Savnsmynd)*

### Sangurin er grundleggjandi

Urguleikarafelagið er helst ikki tað felag, sum er mest úti um seg í miðlunum. Men úrslitið av teirra arbeiði liggur tó ikki eftir fyri tað.

Um fundi í næstu viku verður sagt, at ætlanin er at skifta orð um alt tað, sum kemur einum føroyskum urguleikara við. Til dømis hevur tað í seinastuni verið eitt ávíst orðaskifti um, at hvat eigur at vera høvuðsinstrumentið í eini kirkju ella samkomuhúsi.

Nevndin í urguleikarafelagnum er tó av teirri greiðu áskoðan, at tað fyrst og fremst er mannarøddin, sum skal vera miðdepilin her. Hetta tí sangur er nakað grundleggjandi fyri samleikan hjá okkum.

### Nútíðar sálmar

Formaður felagsins Jens Mortan Mortensen hevur arbeitt við at gera ein upplýsandi faldara til almenningin um Urguleikarafelagið, og fer hann at greiða frá hesum.

Orðaskifti verður eisini um, hvussu »tann føroyski sálmaskatturin« kann gevast víðari til almenningin í eini tíð, har tað vindur alt meira upp á seg at syngja á útlendskum máli.

Eisini verður spurt, hvussu urguundirvísing kann fáast í skipaða legu í fólkaskúlanum, og hvørt tað ber til at hava serliga urgudagar fyri klavernæmingum kring landið.

Annars sigur felagið í tíðindaskrivi, at tað í løtuni verður arbeitt saman við Presta- og Rithøvundafelagnum um at halda skeið í yrking av nútíðar kvalitetssálmum.

Fyrireikararnir siga, at bæði urguleikarar og áhugað annars eru vælkomin til tiltakið, men at tilmelding er neyðug, tá dagurin eisini fevnir um eitt felags ábit.

# Føroyskt oljufelag fer á leiting í Norðsjónum

**– Hetta gevur okkum eitt breiðari fundament at standa á, sigur Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni. Í løtuni hevur felagið loyvir bæði í føroyskum og bretskum sjóøki**

OLJUVINNA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Føroya Kolvetni er nú í ferð við at spenna seg rættiliga út, bæði á føroyskum sjóøki, men eisini í Norðsjónum.

Felagið var við í 2. útbjóðingarumfari á okkara leiðum, men hevur nú haraftrat ognað sær sær 90 prosent av tveimum økjum í bretska partinum av Norðsjónum. Økini eru latin av stóru oljufyritøkunum Shell og Esso í Bretlandi.

Meðan okkara sjóøki enn ikki er fult kannað, so er Norðsjógvurin, har nógv oljuvirksemi er, rættiliga væl lýstur og kortlagdur.




*– At vit nú eisini fara til verka í Norðsjónum er eitt veruligt frambrot fyri okkum, sigur Niels Sørensen, stjóri í Føroya Kolvetni*

– Hetta er tí at meta sum eitt veruligt frambrot fyri okkum, sigur Niels Sørensen við Sosialin.

Føroya Kolvetni, ið er dótturfelag hjá tí størra Faroe Petroleum, hevur í løtuni 10 loyvir. Av hesum eru fýra í føroyskum sjóøki, har felagið stendur fyri arbeiðinum í tí eina, meðan teir í bretskum øki hava seks loyvi og eru fyristøðufólk á tveimum.

Við hesi nýggju ætlanini í Norðsjónum hevur felagið sostatt 11 loyvir. Tí verður við spenningi sæð fram ímóti komandi tíð innan oljuvinnuna.

### Lovandi ætlan

Tey bæði økini, sum Føroya Kolvetni hevur ognað sær, liggja í tí bretska partinum av Norðsjónum.

Talan er um tvey øki á Halibut Horst, ið fevna um einar 217 ferkilometrar á 140 metra dýpi. Økini liggja skamt frá og ímillum oljukeldurnar, Claymore og Blake, har oljuvirksemi er. Føroya Kolvetni lýsir økini sum "lovandi" og "óborað", samstundis sum felagið upplýsir, at tað er væl kent, at kolvetni seyra úr havbotninum.

Fyrimunurin við júst hesum nýggju økjunum hjá Føroya Kolvetni er, at tey eru á grunnum vatni, og at ætlaða oljuleitingin tí er mett at gerast lutfallsliga bílig.

Ein annar fyrimunur er, at tað ber til at flyta møguliga olju og gass gjøgnum rørleiðingar, sum longu eru har um leiðir.

### Avmarkaður váði

Graham Stewart, stjóri í móðurfelagnum Faroe Petroleum sigur við heimasíðuna hjá Sparikassanum, at hetta er fyrsti handilin hjá felagnum í Norðsjónum.

– Hann hóskar sera væl saman við høvuðsætlan felagsins um at tryggja fjølbroytni og virðisøking á virkisøkjunum, samstundis sum váðin sum heild í virkseminum verður avmarkaður.

Avtalað er, at Shell heldur fram sum medeigari og samstarvsfelagi saman við Føroya Kolvetni á teimum báðum oljuøkjunum á Halibut Horst í Norðsjónum.

Saman við Shell fer Føroya Kolvetni nú undir at viðgera seismiskar upplýsingar, til tess at finna eitt hóskandi stað at seta borin í havbotnin.

Føroya Kolvetni er somuleiðis millum feløgini, ið fingu tillutað leitiloyvi í 2. útbjóðingarumfari á føroyskum øki herfyri.

Felagið er skrásett á bretska virðisbrævamarknaðinum, London Stock Exchange.